## Vegleiðing um vaktmyndatól

Nýtslan av vakmyndatólum er støðugt vaksandi í londunum rundan um okkum, og Dátueftirlitið metir, at hetta sama helst eisini er galdandi í Føroyum. Í vegleiðingini er ein listi við fimm høvuðspunktum, sum farast skal ígjøgnum, tá talan er um vaktarhald, sum er fevnt av persónsupplýsingarlógini. Høvuðspunktini eru: Er veruliga neyðugt við eftirliti, hevur tú hugsað um aðrar møguleikar, er tað loyvt at hava eftirlit við økinum við vakmyndatóli, kennir tú tínar skyldur, tá ið tú hevur eftirlit og brúkar tú minst víðfevnandi hátt at hava eftirlit. Vegleiðingin kann lesast á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum www.datueftirlitid.fo



## Leggja møguliga hallir saman

Badmintonhøllin í Klaksvík letur upp í næstum, og býráðspolitikkarnir taka í annaðkvøld støðu til um hallirnar skulu knýtast saman. Hetta kemur til viðgerðar á býráðsfundinum í annaðkvøld, skrivar heimasíðan hjá Klaksvíkar kommunu. Tað verður mett at hava stóran fyrimun, at hallirnar verða samanbygdar. Hetta vil geva møguleikar fyri at gagnnýta báðar hallirnar til størri tiltøk. Leingi hevur verið tosað um at samanbyggja hallirnar við svimjihøllina og er hetta fyrsta byggistigið í samlaðu ætlanini. Gerst hetta veruleiki, fer økið óivað at gerast ein kraftdepil mitt í Klaksvík.

# Helle Thorning-Schmidt vil hava praktiskt samstarv við føroyingar

**- Vit skulu hava ein praktiskan ríkisfelagsskap. Tað var ein boðskapur hjá forkvinnuni í danska Javnaðarflokkinum á landsfundinum hjá Føroya Javnaðarflokki í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ríkisfelagsskapurin hevur snúð seg ov nógv um lógir og paragraffir og tað skal broytast, var boðskapurin frá Helle Thorning-Schmidt til føroyingar á landsfundi Javnaðarfloksins fríggjakvøldið*

- Felagsskapur er lyklaorðið í ríkisfelagsskapinum.

Tað staðfesti Forkvinnan í danska javnaðarflokkinum, Helle Thorning-Schmidt, á landsfundinum hjá Føroya Javnaðarflokki í Norðurlandahúsinum figgjakvøldið.

Thorning-Schmidt kom ikki sjálv til Føroya, men tosaði við fundarfólkið á stórskíggja.

- Eg vil hava ein ríkisfelagsskap, sum tit øll eru ein partur í og sum byggir á javnrætt, á virðing og eitt praktiskt samstarv.

Hon helt, at júst hetta er so avgerðandi fyri ríkisfelagsskapin.

- Ríkisfelagsskapurin snýr seg ikki bara um lógir og paragraffir. Tað snýr seg eisini um, at tað eru sterk familjubond ímillum Føroyar og Danmark og tað er eisini vert at hugsa um, so at ríkisfelagsskapurin ikki bara snýr seg um lógir og paragraffir.

Hon gleddi seg til at fáa eitt betri samskifti við føroyingar, tí hon helt samskiftið ímillum Føroyar Og Danmark hevur alt ov leingi verið merkt av lógum og paragraffum og hon helt, at tað vóru gróðrarlíkindi fyri einum betri samstarvi.

Helle Thorning-Schmidt segði eisini, at sum politiska støðan Danmark er, og sum hon kann verða eftir valið, kann tað enda við, at teir báðir føroysku fólkatingslimirnir fáa stóran, politiskan týdning.

Og hon duldi heldur ikki fyri, at tey fóru at ynskja einum føroyskum fólkatingslimi úr Javnaðarflokkinum vælkomnum og hon helt, at tað hevði verið hugaligt at kunna knýtt samband ímillum tær báðar sosialdemokratisku familjurnar.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, tók væl ímóti boðskapinum um ein praktiskan ríkisfelagsskap.

- Ríkisfelagsskapurin hevur alt ov leingi snúð seg um lógfrøði, har vit hava dyrkað lógargreinar, heldur enn at samstarva um politikk – um politikki, sum kann føra til loysnir.

- Tað gleði eg meg til, legði løgmaður afturat.

Eisini Helena Dam Neystabø helt, at tað átti at borið til at samstarva á jøvnum føti og hon heitti á forkvinnuna um at samstarva um at forma eitt samstarv á jøvnum føti

Helle Thorning-Smidt staðfesti, at koma ynski úr Føroyum um broytingar í ríkisfelagsskapinum, vil hon lurta eftir tí.

- Kanska eru tað teir báðir javnaðarflokkarnir, sum hava bestan møguleika at ganga á odda á bøta um samstarvi ímillum Føroya og Danmark, legði hon afturat.

Hans Pauli Strøm fegnast:

# Pensjónin í Føroyum er nú hægri enn í Danmark

**Á Landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum í dag var Hans Pauli Strøm, landsstýrisdmaður, fegin um, at tað hevur eydnast at hækka fólkapensjónina í Føroyum so nógv, at hon nú er hægri enn í Danmark**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hans Pauli Strøm er bæði fegin og stoltur av, at tað hevur eydnast at lyfta føroysku fólkapensjónirnar so høgt upp, at ein føroyskur pensjónistur nú hevur meiri eftir enn ein danskur*

Tað hevur mangan verið funnist at føroyskum politikarum fyri, at teir ikki hava megnað at útvega eldri føroyingum eina hóskandi pensjón.

Ført hevur verið fram, at fólkapensjónin í Føroyum er munandi lægri enn í Danmark.

Á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum í morgun staðfesti, Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, at hetta er ikki longur sannleikin.

Og á nýggjarinum hendir enntá tað sóðbrótandi, at tá fer fólkapensjónin í Føroyum enntá eitt vet upp um pensjónina í Danmark, tá ið skatturin er betaltur.

Orsøkin til hetta er ,at 1. januar hækkar útgjaldið úr Samhaldsfasta 370 krónur um mánaðin, úr 1.860 í 2.230 krónur.

- Samstundis er lógaruppskot til viðgerðar á løgtingi, sum hækkar viðbótina til ávísar pensjonistar, sum verður útgoldin 3 ferðir um árið, úr 5.556 kr krónur upp í 6.924 krónur um árið.

Hóast pensjónin í Danmark er hægri enn í Føroyum, betalur ein danskur pensjónistur so mikið nógv í skatti, at tá ið alt er talt saman og drigið frá, hevur føroyska pensjonistin meiri eftir á kistubotninum enn tann danski hevur.

Hans Pauli Strøm vísti á, at ein uppfgerð vísir, at næsta ár, fer ein føroyskur pensjónistur at

Hava 9.186 krónur eftir um mánaðin og tað er 247 krónur meiri enn tann danski pensjónisturin hevur, tí hann eigur bara 8.939 krónur eftir av pensjónini, tá ið skatturin er goldin.

Taka vit so eini hjún, har bæði eru pensjónistar, hava føroysku pensjónista-hjúnini 15.120 krónur eftir av fólkapensjónini, tá ið skatturin er betaltur og tað er 584 krónur meiri enn eini donsk pensjónistahjún hava, tí hjá teimum er bara 14.536 krónur eftir.

Hann staðfesti eisini, at sostatt hevur hendan samgongan megnað at hækka fólkapensjónirnar heili 25% og tað var hann bæði stoltur av og fegin um.